


*Jógvan Højgaard og Oddmar Ørvarodd eru stjórar hjá P/F Wenzel*

*Mynd: Alfie*

# Jógvan og Oddmar stjórar hja P/F Wenzel

**Tá Gunnar Justinussen og holdingfelagið Sjóborg keyptu bilasøluna P/F Wenzel fyrst í oktober, vórðu Jógvan Højgaard og Oddmar Ørvarodd, sum báðir hava arbeitt í mong ár í fyritøkuni, settir sum stjórar í fyritøkuni**

FYRITØKA

Fyrst í oktober var elsta bilfyritøka í Føroyum seld. Talan er um P/F Wenzel, sum hevur verið í somu familju í úti við 90 ár. Fyritøkan hevur røtur heilt aftur til 1917, tá Wenzel Petersen stovnaði ein maskinhandil í Havn. Fyritøkan seldi fyrsta bilin, sum kom á land í Føroyum í 1922.

Nú hevur Gunnar Justinussen og holdingfelagið Sjóborg keypt bilasøluna P/F Wenzel við bæði bygningunum og Ford-umboðnum.

Jógvan Højgaard og Oddmar Ørvarodd, sum báðir hava arbeitt í mong ár í fyritøkuni, eru nú stjórar í fyritøkuni, meðan Gunnar Justinussen er nevndarformaður.

Jógvan og Oddmar siga, at teir síggja nógvar møguleikar við Ford. Avbjóðingin hjá teimum er, at Ford fáa ein enn størri marknaðarpart av bilasøluni í Føroyum. Teir hava eitt stórt og spennandi programm av bæði persón- og vørubilum. Nýggju Ford Galaxy og S-Max eru nýliga komnir á marknaðin, og ein heilt nýggjur Ford Mondeo kemur í vár, og seinni kemur eisini ein nýggjur C-Max.

Hjá P/F Wenzel eru tríggjar deildir: bilverkstaðurin, eykalutagoymslan og bilasølan.



Endurskinsdagurin:

# Vinnarar av kappingini

Vinnarar í kappingini, sum varð fyriskipað á „Endurskinsdegnum 7. des 2006“ vóru niðanfyristandandi.

Føroya Sparikassi hevur latið vinningarnar.



***Nr 1: 6.b í Fuglafjarðar Skúla.*** *Teir 15 næmingarnir savnaðu tils. 697 endurskin ella í miðal 46. Flokkurin fær 3000,- kr*



***Nr 2: 7.a í Eysturskúlanum.*** *Teir 19 næmingarnir savnaðu tils. 836 endurskin ella í miðal 44. Flokkurin fær 2000,- kr.*



***Nr 3: 4.a í Fuglafjarðar Skúla.*** *Teir 16 næmingarnir savnaðu tils. 6544 endurskin ella í miðal 34. Flokkurin fær 1000,- kr.*